# Fårtplan

for

**Dampbaad „Ruth" til Skaalefjord og Sundelaget.**

Fra og med 1ste Aug. til og med 30te Septbr. 1908.

| Mandag | Tirsdag | Onsdag | Torsdag | Fredag | Lørdag |
|---|---|---|---|---|---|
| Thorshavn | Thorshavn | Thorshavn | Thorshavn | Thorshavn | Thorshavn |
| Tofte | Kollefjord | Selletræ | Strænder | Kollefjord | Selletræ |
| Glibre | Thorsvig | Øre | Skaale | Thorsvig | Øre |
| Solmunde | Kvalvig | Kvalvig | Solmunde | Kvalvig | Kvalvig |
| Skaale | Øre | Thorsvig | Glibre | Øre | Thorsvig |
| Strænder | Selletræ | Kollefjord | Tofte | Selletræ | Kollefjord |
| Selletræ | Tofte | Strænder | Selletræ | Strænder | Tofte |
| Øre | Glibre | Solmunde | Øre | Solmunde | Glibre |
| Kvalvig | Solmunde | Glibre | Kvalvig | Glibre | Solmunde |
| Thorsvig | Strænder | Tofte | Thorsvig | Tofte | Skaale |
| Kollefjord | Kalbak | Kalbak | Kollefjord | Kalbak | Strænder |
| Kalbak | Thorshavn | Thorshavn | Kalbak | Thorshavn | Kalbak |
| Thorshavn | | | Thorshavn | | Thorshavn |

A/S „Thorshavns Mælkeforsyning".

## Passager-Takst

for

Dampbaad »Ruth«.

| | Glibre | Kalbak | Kollefjord | Kvalvig | Selletræ | Skaale | Solmunde | Strænder | Thorshavn | Thorsvig | Tofte | Øre |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Glibre | | 50 | 50 | 100 | 100 | 50 | 50 | 50 | 75 | 100 | 50 | 100 |
| Kalbak | 50 | | 50 | 75 | 75 | 75 | 75 | 50 | 50 | 75 | 50 | 75 |
| Kollefjord | 50 | 50 | | 50 | 50 | 75 | 75 | 50 | 75 | 50 | 50 | 50 |
| Kvalvig | 100 | 75 | 50 | | 50 | 100 | 100 | 75 | 100 | 50 | 75 | 50 |
| Selletræ | 100 | 75 | 50 | 50 | | 100 | 100 | 75 | 100 | 50 | 75 | 50 |
| Skaale | 50 | 75 | 75 | 100 | 100 | | 50 | 50 | 75 | 100 | 50 | 100 |
| Solmunde | 50 | 75 | 75 | 100 | 100 | 50 | | 50 | 75 | 100 | 50 | 100 |
| Strænder | 50 | 50 | 50 | 75 | 75 | 50 | 50 | | 50 | 75 | 50 | 75 |
| Thorshavn | 75 | 50 | 75 | 100 | 100 | 75 | 75 | 50 | | 100 | 50 | 100 |
| Thorsvig | 100 | 75 | 50 | 50 | 50 | 100 | 100 | 75 | 100 | | 75 | 50 |
| Tofte | 50 | 50 | 50 | 75 | 75 | 50 | 50 | 50 | 50 | 75 | | 75 |
| Øre | 100 | 75 | 50 | 50 | 50 | 100 | 100 | 75 | 100 | 50 | 75 | |

A/S „Thorshavns Mælkeforsyning".

*Fyrsta ferðaætlan við takstum*

vala fyritøkan ikki, og tí er eisini vert at minnast hana nú 100 ár eru liðin, síðan hon skapti søgu.

## Petur Háberg: Ævintýrferð við "Ruth"

**Petur Háberg skrivaði í síni tíð eisini eina grein í Hugbirtingar um mjólkarforsýningina. Millum annað skrivar hann um eina ferð inn á Skálafjørðin við Ruth**

Tað er ein góðan summardag í 1921, tíðliga um morgunin. Ein 7 ára gamal havnardrongur (Petur sjálvur) stendur har frammi á mjólkarbátinum Ruth og hyggur eftir, hvussu tað skúmar frá bógnum, meðan báturin stillisliga sker seg gjøgnum sjógvin, einki motordunk, eingin risting. Men hetta er eisini en stórur dampari, heldur hann. Hetta er fyrstu ferð, hann sjóvegis er farin heimanifrá. Hann fer ein túr aftureftir. Nøkur fólk sita á lastalúkuni. Her er eisini ein so blíð kona. Hon peikar móti einum landi við nøkrum húsum langt burturi og sigur: "Hatta er Toftir - har skal eg fara. Men tað verður ikki enn á sinni, at vit koma so langt. Og inn ímillum har einastaðni liggja Heiðarnar, har sum tú skal fara, og tað verður upp aftur longur. "Nei, sum hetta landið er stórt", hugsar drongurin. Lagt verður at inni á einum firði, menn rokast umborð og á bryggjuni. Dreingir og hundar koma rennandi oman eftir gøtuni fyri at vera við til dagsins stórhending. Tómir mjólkadunkar verða langaðir í land, meðan menn taka ímóti fullum dunkum, sum nokk eru tungir at lyfta, tí at menninir rodna í andlitinum. Okkurt fólk fer í land, og onnur koma umborð og veitra dúgliga, tá ið báturin fer frá aftur. Hetta hendir fleiri ferðir.

Eina ferð verður lagt at við eina hvalastøð. Har flóta reyðbláir uppblástir innvølir av hvalum, har er ørgrynna av likkum, sum berjast um garnar og leika so í, at tað ikki hoyrist mannamál. Menn flensa hálvuppskornan hval, og har er nakað sami roykur sum við lýsihúsið úti á Rundingi.

At enda verður lagt at, har drongurin skal í land og blíð fólk taka hann við sær, har hann skuldi uppliva 14 ævintýrdagar. Men tað hevur einki við hesa søgu at gera.

Hesin bátur, sum í dreingjaeygum var ein stórur dampari, var dampbátur, men ikki var hann meira enn 15 tons brutto, keyptur í Stavanger í 1908 fyri 14.000 kr.

### Yvirtrúgv

Tað er soleiðis, at millum siglandi menn trívist rættiliga nógv av tí, sum landkrabbar kalla yvirtrúgv. Ikki bert millum fiskimenn og langfaramenn. Eisini millum teir ið røkja rutusigling. Og sumt er ikki rætt bert at skýra sum yvirtrúgv. Eg visti, at á einum av hesum rutubátunum vóru teir fullvísir í, at kom ein viss kona umborð, so fingu teir ein ringan túr. Ein fagran summardag sóu teir hana koma umborð. Hon skuldi til Havnar. Teir gløddu hvør uppá annan, men uggaðu seg við, at hetta góða veðrið kundi ikki broytast uppá tímar. Men hvat ið var ella ikki, hann dró á luftina beinanvegin, og at ætla í sjónum, og tá ið teir vóru komnir hálvan vegin, var so nógvur vindur og so ringt í sjónum, at tað gjørdist ein av teim mest knossasligu sjóverkstúrum, teir vistu frá at siga.




*Poststemplið hjá Ruth*

**Komandi partur**
Í komandi Miðviku fara vit at greiða frá blaðnum Baldursbrá hjá Havnar Ungmannafelag, sum hevði sína livitíð 1906-1912. Vit taka nakrar av teimum mest forvitnisligu greinunum.

# Skipini hjá Meiarínum:

**1. Ruth**. Keypt í juni 1908 úr Stavanger í Noregi fyri kr. 14.000. 15 brt. Longdin var 13,55 m og breiddin 3,92 m, djúpd 1,91 m. Søkt á Sørvágsfirði januar 1976.

**2. Sigmundur**. Keyptur í mars 1923 frá Handilsforeiningini fyri kr. 9.000. Hann var bygdur úr eik á Skála í 1920 og tók 25 ferðafólk. Hevði ein 40 hk gløðihøvdmotor, helst Gideon. Hetta er annars sami Sigmundur, sum sigldi við mjólk, posti og ferðafólki millum Oyrabakka og Hvalvík árini 1964-69. Tá átti felagið Oyggjaleiðir hann. Báturin er til enn og hevur enn sama navn. Stendur á kajuni í Miðvági, keyptur fyri 1 kr. Góðir menn hava í umbúna at varðveita bátin.

**3. Dúgvan**. Keypt í desember 1926 úr búnum hjá M C Restorff og Sønner fyri kr. 5.000. Bygd av Elias í Rættará til Vágsbotnshandilin.

**4. Tróndur**. Áður Odden. Bygdur í 1920 í Drøbak, keyptur úr Oslo í apríl 1926 fyri nkr. 21.000. Tók 100 ferðafólk umframt 20 tons av farmi. 69 brt. Seinni umbygdur og tók tá 135 fólk. Longd 73 m, breidd 16 m, og djúpt 6,2 m. Settur á land norðanfyri Hósvík. Varð fyribeindur februar 1963.

**5. Streymur**. Bygdur 1930 í Frederikssund. Keyptur úr trotabúnum hjá Ísvirkinum á Tvøroyri í 1932 fyri kr. 40.000. Tók 85 ferðafólk umframt farm. 48 brt. Hevði 108 hesta motor. Varð søktur út fyri Eystnes.

**6. Sigmundur**. Keyptur í 1949 sum Green Dolphin úr Bretlandi fyri kr 135.500. Tók 180 ferðafólk. Var 169 brt. og bygdur í 1941 í Gosport. Hevði verið nýttur sum minusópari. Motorurin var ein 7 syl. 2 takt dieselmaskina frá British Awxiliaries Ltd., 500 hk. Fórst eina ódnarveðursnátt í februar 1950 úti í Grind.

**7. Sigmundur**. Bygdur í 1942 í Peterhead. Hevði eisini verið brúktur sum minusópari. Keyptur í mars 1950 fyri kr. 80.000. 150 brt. Tók 250 ferðafólk. Var nógv umbygdur, áðrenn hann í november sama ár kom til Føroyar. Tá kostaði hann kr. 200.000. Hevði 2 takt dieselmaskinu, Harland&Wolff, Belfast, 600 hk. Varð søktur millum Stong og Eystnes november 1973.

**8. Tróndur**. Keyptur í oktober 1967 frá Møre-Romsdals Fylkesbåter í Noregi. Kallaðist Smøla. Sigldi sín fyrsta túr 12. desember sama ár. Keypsprísurin var 2,5 mill. kr. Tók 300 ferðafólk og 18 bilar.

1. apríl í 1974 yvirtók landið hann, og var hann tískil seinasta skip hjá hesum slóðbrótandi felag. Hetta var eisini í tráð við løgtingslóg frá 15. mars 1939, tá løgtingið tók sær rættindini at ráða fyri alla strandfarasigling. Ímeðan hevði mjólkaforsýningin siglt við serligum loyvi/loyvisbrævi.